# einfaldari

*- ger tað einfaldari*

November 2011




Til tey, sum eru nýggj í samkomuni ella vilja vita meira um Lívdina, er ein vælkomupakki gjørdur.

Í pakkanum er m.a. faldarin “Vælkomin í Lívdina” við øllum upplýsingum um samkomuna, faldarin hjá Glóðini, sangbók og eitt hefti við hugsjónini hjá samkomuni og hvat Lívdin stendur fyri. Vælkomupakkin er á kunningarborðinum, meðan møtini eru hvønn sunnudag.

Ynski okkara er, at øll skulu kenna seg vælkomin, sama hvørji bakgrund ella hvørjum lívsumstøðum, ein kemur frá.

Lívdin – í livd hins hægsta

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

### Øll eitt í Kristi Jesusi

Nógv verður tosað um leiklutin hjá kvinnuni í samkomuni fyri tíðina, og tað hevur nógv størri týdning, enn vit geva okkum far um. Gal. 3:28 sigur: "Her er ikki Jødi ella Grikki, her er ikki trælur ella frælsur, her er ikki maður ella kvinna; tí tit eru øll eitt í Kristi Jesusi." Grundleggjandi fyri evangeliska gudfrøði stendur hendan sannføringin føst, at í samfelag teirra endurføddu í Kristusi eru vit sett frí frá banni syndarinnar, og at eingin munur er á, hvørji vit eru, ella hvør leiklutur okkara er í ríki Guds sum kvinnur og menn. Tað er tó grundleggjandi stórur munur á hvussu vit eru, og hvussu vit útinna tær uppgávur og ábyrgdir, ið Gud hevur kallað okkum til. Gud sigur: "So skapti Gud menniskjuna í bílæti Sínum; í bílæti Guds skapti Hann hana; sum mann og kvinnu skapti Hann tey." Latið okkum ikki døma hvørt annað eftir okkara kyni, men latið okkum eggja hvørt annað til at nýta tær gávur og útinna tað kall, ið Gud hevur kallað okkum til sum kvinnur og menn.

*Jógvan Zachariassen*

## HENDINGAR & TILTØK

### Christmas Child 2011



Sunnudagin 30. oktober var seinasta freist at lata skógvaeskjur inn til Christmas Child tiltakið í Føroyum.

Tilsamans 4790 skógvaeskjur vórðu sendar av landinum í mun til 4850 eskjur í fjør. Í ár verða eskjurnar latnar til børn í Kirgistan.

### Familjumøti og Hoyvíksmøti

Sum tað sæst á skránni, hava tey ymsu møtini og tiltøkini í Lívdini fingið sítt egna heiti. Fyrra møtið sunnudag eitur “Familjumøti”, seinna møtið sunnudag eitur “Hoyvíksmøti”, undirvísingin týskvøld eitur “Minibíbliuskúli”, ungdómsarbeiðið eitur “Ignite”, og tiltakið, sum tey ungu skipa fyri hvørt leygarkvøld, eitur “Alive”.

### Til lukku við føðingardegnum



Mánadagin 17. oktober fylti Bjarni Jøkladal í Hoyvík 85 ár.

### Til lukku við barninum

2. november fingu Annbritt og Alex Jacobsen, í Hoyvík ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3970 gr.

### Hjúnakvøld í Lonini

Leygarkvøldið 12. november er ætlanin at hava eitt hjúnakvøld í Lonini. Jógvan Jacobsen luttekur.

Tilmelding fer fram hjá Lív Clementsen, t-postur lhc@kalnet.fo tel. 516714.



## Aktivitetsdagur fyri menn



Leygardagin 19. november er ætlanin hava ein aktivitetsdag fyri menn. Aldursmarkið er 20 ár og eldri. Á skránni verður bowling, paintball-dystur og ein góð máltíð.

Byrjað verður kl. 12.30, og tiltakið verður liðugt uml. kl. 18.30. Kostnaður fyri tiltakið er kr. 250,-. Tilmelding fer fram hjá Absalon Áargarð, t-post: absalon@livdin.fo, tel. 594020.

## Opið hús í Lonini



Hósdagar frá kl. 16.00 til 18.30 er opið hús í Lonini. Ætlanin er, at opið hús skal vera í Lonini hvønn hósdag í vetur, har øll eru vælkomin inn á gólvið til drekkamunn og góða samveru.

## Vit tæna einum nýggjum Harra

Vit eru vanabundnir skapningar, sum heldur velja tryggleikan í trælahaldinum enn vandan í frælsinum. Men nú hava vit fingið frælsi og tæna einum nýggjum Harra, sum hevur givið okkum nýtt lív, nýggjan kærleika, nýtt samfelag og eina púra øðrvísi framtíð.

*Charles R. Swindoll - í bókini Náðiveking*

## Lívdin á Facebook

Lívdin hevur fingið sín egna profil á Facebook, sum er www.facebook.com/Livdin. Har verða upplýsingar um aktivitetir o.a. regluliga lagdir út.

## Minibíbliuskúli og bønarmøti




Minibíbliuskúli er týskvøld í Lonini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður Minibíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, læru og bøn.

**Skráin fyri týskvøldini november 2011**

*Týskvøldið 1. november*
Kyknubólkar
(Lonin opin til bøn og samveru frá kl. 20.30)

*Týskvøldið 8. november*
Missiónsboðini eru meira enn missiónsboð
v/Jógvan Zachariassen

*Týskvøldið 15. november*
Er Jesus til verka í dag
v/Johan Syderbø

*Týskvøldið 22. november*
Kyknubólkar
(Lonin opin til bøn og samveru frá kl. 20.30)

*Týskvøldið 29. november*
Er pláss fyri Jesusi í framtíðini
v/Annu Háberg

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

### Sunnudagin 6. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Evni: Deyðahavsrullurnar<br>Talari: Jógvan Zachariassen |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Talari: Símun Absalonsen |



Jógvan

### Sunnudagin  13. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Søga um kvinnu í skriftini<br>v/Beintu Áargarð |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Kvinnan skal ikki leiða?<br>Talari: Jógvan Zachariassen |

Símun



### Sunnudagin 20. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Søga um kvinnu í skriftini<br>v/Unn Zachariassen |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Hvat so við henni?<br>Talari: Jógvan Zachariassen |



Beinta

### Sunnudagin 27. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Virðið í tí brotna<br>v/Johannu Andreasen |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni:  Virðið í tí brotna<br>Talari: Anna Háberg |



Unn

### Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00

Johanna



** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

Anna



*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*